Helmer Christensen

Vættrahjálp

Leikarar:

Marin _____

Sveinur (sonur hennara) _____

Stórbóndin _____

Bóndakonan _____

Magna (bóndadóttir) _____

Margreta (bóndadóttir) _____

Adolf (bóndasonur) _____

Mikkelsen (politimaður) _____

Vætturin _____

Týtt: Sonja Sørensen

Eitt sindur um sjónleika-venjing við børnum

Fyrst verður leikurin lisin upp í síni heild. Roynt verður at gera leikin so spennandi hjá børnunum sum gjørligt.

Síðani verður ein mynd vand í senn. Børnini kunnu spæla ein part nakrar ferðir við ongum handriti (improvisatión), har børnini skiftast at hava teir ymsu leiklutirnar. Um lærarin velur »skeivt« fyrstu ferð, kann tað verða trupult at skifta seinni og ikki særa okkurt av børnunum.

Tá ið børnini hava spælt leikin nakrar ferðir og hava *skilt gongdina* í leikinum, verða leiklutirnir ásettir og handrit býtt út. — Nú verður heitt á børnini um at læra seg leiklutin uttanat.

Nú er so at vóna, at børnini sjálv duga at síggja, at summi hóska best til ein leiklut, onnur til onkran annan.

Tað hevur eisini stóran týdning at fáa børnini at skilja, at allir leiklutir eru týdningarmiklir; tey, sum arbeiða aftanfyri á pallinum, har alt skal gerast stundisliga og stillisliga, hava eins stóran týdning og tey, sum standa á palli.

Tað er heldur ikki bara tey, sum siga okkurt beint nú — ella skulu siga nógv í leikinum — sum eru týdningarmikil. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann leggja nógv afturat leikinum, um hann spælir væl í røttu løtu. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann taka nógv frá leikinum, um hann dregur ov nógv eygu at sær, tá ið hann ikki skal.

Fyrstu ferð, ið vant verður rættiliga á palli, skulu børnini læra at arbeiða aftan fyri pallin og ikki larma. Tað loysir seg at brúka nógva tíð til at venja hetta.

Royn skjótast gjørligt at áseta, hvar leikarin skal ganga og standa, tá ið hann skal siga okkurt. Tá festa setningarnir seg betur, og leikararnir vera tryggari.

Ven børnini frá byrjan at venda sær ímóti áskoðarunum, tá ið tey tosa, og at tosa *nógv* harðari og týðiligari, enn tey halda seg skulu.

Hini børnini kunnu fara oman í salin at eygleiða og lurta, um tað hoyrist nóg væl.

Royn at fáa børnini *ikki* at skunda sær. Onkuntíð hevur tað, at steðga á, mest at siga.

Leiklutirnir:
Leikararnir eru níggju í tali. Sveinur og mamma hansara, stórbóndin, kona hansara og trý børn, ein politimaður, ein vættur.

Viðmerkingar:
Í sýningini eru tvær pallmyndir. Tær standa allan leikin. Einki tjald er fremst á pallinum. Myndirnar skifta soleiðis, at ljósið verður tendrað og sløkt. Hetta kann sjálvsagt eisini gerast á vanligan hátt við leiktjøldum.

Pallmyndir:
Pallmynd 1: Vinstumegin. Umleið ein fjórðingur av pallinum. Her er eitt borð og ein stólur. Leiktjald aftanfyri: Eitt lítið vindeyga.
Pallmynd 2: Høgrumegin. Umleið tríggir fjórðingar av pallinum. Her er ein sofa, eitt sofaborð, ein stólur, eitt skáp, eitt telefonborð, ein gamaldags telefon *(við handsveiggi)* og ein vasi. Leiktjald aftanfyri: Tvey ella trý stór vindeygu og einir tveir málningar.

Uppskot til búnar og smyrsl:
Marin: Gráhærd, rukkut í andlitið, sjúkrakassabrillur, í síðum, svørtum kjóla.
Sveinur: Í skjúrtu við ongari flippu, vesti og slitnum brókum.
Stórbóndin: Í hvítum jakka, í vesti við gullketu, knæbuksum, pípu.
Bóndakonan: Hárið er farið at grána, sett upp. Í síðum, svørtum kjóla, høgur upp í hálsin við hvítum kraga, stóra brosju.
Magna og Margreta: Hárið er sett upp við hárspennum ella flættað, í síðum kjólum.
Adolf: Í stríputari skjúrtu við ongari flippu, svørtum vesti, svørtum brókum.
Mikkelsen politimaður: Í búna við kasketti *(helst einum gomlum búna)*
Vætturin: Í reyðari húgvu, troyggju ella koti, gráum brókum.

Byrjan

Ljós á frásøgumannin, sum stendur heilt frammarlaga høgrumegin á pallinum.

Frásøgumaðurin lesur:
Í gomlum døgum, tá ið jólini nærkaðust, savnaðust øll í húsinum at lurta eftir søgum úr tí nýggju jólabókini, sum abbi hevði keypt. Slíkar søgur søgdu ofta frá fátækum fólkum, sum høvdu tað ringt. Men beint upp undir jól hendi okkurt, sum heilt broytti lív teirra, soleiðis at søgan endaði væl.

Oftani var eisini ein vættur við í søguni – ikki tann stóri jólamaðurin, sum er at síggja í sølubúðunum upp undir jól; nei, vætturin búði á bóndagarðinum og ansaði eftir honum. Men hesir vættrarnir skikkaðu sær ikki altíð væl. Vóru teir ikki væl viðfarnir, kundi tað henda, at teir hevndu seg.

Hetta, eg nú fari at siga tykkum, hendi á bygd fyri nógvum árum síðani. Ein ungur, fátækur maður búði í eini lítlari smáttu saman við hjartagóðu móður síni. Tætt við var ein stórur bóndagarður. Her búði ein ríkur óðalsbóndi saman við konu síni og trimum børnum, tveimum døtrum og einum syni.

Søgan byrjar hjá teirri fátøku konuni.

(Ljósið á frásøgumannin slóknar. Hann fer út.)

1. partur

Ljós á pallmynd 1.
(Í teirri lítlu smáttuni situr Marin og bindur. Sveinur, sonurin, kemur inn.)

Sveinur: *(Gníggjar sær í hendurnar)* Puhh, tað er kalt úti. Hetta verður ein kaldur jólaaftan.

Marin: Ja, tað er gott, at vit hava brenni at leggja í ovnin, men stórt meira hava vit heldur ikki. Tað er so at siga eingin matur eftir. Vit hava bara nøkur tunn riv og nøkur fá epli. Hesi jólini vera nakað kørg.

Sveinur: Eiga vit ikki so frægt sum eina skál av rísi, so vit kunnu seta jólagreyt út til vætturin?

Marin: Nei, tað eiga vit ikki. Hetta verður fyrsta ferðin, hon einki fær til jóla, men vit eiga ongar pengar; tú veitst, at teir síðstu pengarnir fóru til avdrøg upp á húsini.

Sveinur: Ja, tað veit eg. Men vætturin skal hava jólagreyt, og eg hevði eisini ætlað mær at keypt tær eina jólagávu.

Marin: Ja, men hvussu skalt tú bera teg at við tí?

Sveinur: Eg fari niðan til stórbóndan og biði um forskot. So kundi tað eisini hent, at eg hitti Magnu.

Marin: Áh, ja, góði tú, eg veit, at tú ert góður við hasa gentuna. Men tú ert fátækur, og stórbóndin fer ongantíð at lata dóttur sína giftast einum fátækum manni.

Sveinur: Tað fáa vit at síggja. Nú fari eg, ið hvussu er, niðan.

(Myrkur á pallmynd 1)

2. partur

Ljós á pallmynd 2
(báðar døturnar, Magna og Margreta, eru einsamallar í stovuni)

Margreta: Hevur tú sæð, hvør ið kemur gangandi niðaneftir?

Magna: Hvør?

Margreta: Sveinur úr teimum smáu húsunum.

Magna: *(Hyggur smæðin niður fyri seg)* Áh, hann.

Margreta: Áh, legg einki í, tú rodnar um alt andlitið. Tú ert forlipt í honum, og hann í tær. Hann hyggur altíð at tær við einum smíli í eygunum. Man hann ikki skjótt fara at fríggja?

Magna: Tað hevur hann gjørt, men eg tori ikki at siga ja. Tú veitst væl, at pápi hevði aldrin lovað okkum.

Margreta: *(Bilsin)* HEVUR hann fríggjað? Áh, nú kemur hann. Eg fari, so kunnu tit vera einsamøll. *(Fer stillisliga gnisandi út.)*
(Hurðin gongur, Sveinur kemur inn. Hann hyggur smílandi at Magnu, hon hyggur smæðin niður í gólvið)

Sveinur: Gott kvøld. Ber tað til at tosa við pápa tín?

Magna: Pápi er ikki inni, men so fáa *vit* tosað saman, Sveinur. Áh, mær leingist so eftir tær. Heldur tú ikki, at vit fáa borið tað so í bandið, at vit kunnu giftast?

Sveinur: Í løtuni sær tað svart út. Vit hava brúkt teir síðstu pengarnar til avdrøgini. Men eg hugsaði, at eg skuldi selja epli og vinna mær pening við tað — annars noyðist eg at fara til Amerika og royna at vinna mær pening har yviri, so at vit kunnu giftast.

Magna: Á nei, tú mást ikki fara til Amerika, tað er vandamikið at sigla um Atlantshavið; og í Amerika eru bæði indiánar og brotsmenn og sovorðið. Áh, tú mást verða verandi heima...
(Í somu løtu gongur hurðin, og bóndin kemur inn. Magna nikkar skundisliga til Svein og fer út.)

Stórbónd.: *(Harkar)* Nú, er tað Sveinur. Hvørji eru tíni ørindi, góði?

Sveinur: Jú, síggja tygum. Eg eri komin í neyð við pengum. Vit hava brúkt teir seinastu pengarnar til avdrøgini, so vit hava ongar pengar at halda jól fyri.

Stórbónd.: Hvussu nógv snýr tað seg um?

Sveinur: 50 krónur, um tað hevði latið seg gjørt.

Stórbónd.: Tað var ikki eiti á pengar. Hvat skalt tú brúka teir til?

Sveinur: Til jólagávu til mammu mína. Hon stríðist og strevast, ansar høsnum og geitini og seymar og stoppar fyri meg. Tí vildi eg fegin keypt henni eina jólagávu — og eitt sindur av rísi til jólagreyt.

Stórbónd.: Íðan, lat tað so vera.
(Stórbóndin tekur pening upp úr einum vasa, sum stendur á eini hill. Hann tekur tveir 100 krónu seðlar og ein 50 krónuseðil, so at áskoðararnir síggja tað. Teir báðar 100 krónuseðlarnar leggur hann í aftur vasan og setur hann aftur. Síðani gevur hann Sveini 50 krónuseðilin.)

Stórbónd.: Ger so væl góði — og gleðilig jól — heilsa mær mammu tíni.

Sveinur: Túsund takk, stórbóndin — og gleðilig jól ynski eg tygum og øllum í húsinum. *(Hann bukkar og fer út)*
(Í somu løtu kemur sonurin Adolf inn)

Adolf: Ha! Var hatta ikki hasin fátækradólgurin úr smáttuni? Hvat vildi hann? Mestur skuldi hann læna pening frá tær. Tað er ikki so frægt, at hann tímir at gera nakað til nyttuna og vinna sær pening sjálvur.

Stórbónd.: Eg haldi so víst, at tað eru onnur her á garðinum, sum einki tíma at gera. Hevur tú til dømis minst til at ambæta rossunum?

Adolf: Áh, tað havi eg gloymt.

Stórbónd.: Tað SKALT tú minnast til. Í gjár gloymdi tú tað eisini, og tey neyðars kríatúr stóðu og bitu í krubbuna av berari svongd. Og brenni skuldi tú høgga. Tað gjørdi tú heldur ikki. Systir tín Margreta mátti gera tað, hon hevur annars ivaleyst at gera her í húsinum. — Tú ert latur, Adolf.
(Adolf trútnar)

Stórbónd.: Nú — hvat vildi tú mær?

Adolf: Eg skuldi biðja um eitt lítið forskot.

Stórbónd.: Til hvat?

Adolf: Eg skyldi pengar niðri á vertshúsinum, og eg sleppi ikki at keypa meira upp á borg, fyrr enn eg havi goldið alla rokningina.

Stórbónd.: *(Illsliga)* So tú drekkur og rindar ikki fyri. Hvussu mikið skyldar tú honum?

Adolf: 100 krónur.

Stórbónd.: Hasar pengarnar mást tú sjálvur útvega tær. Eg eigi ikki pening at geva einum brennivínsbarni, sum ikki røkir sítt arbeiði. — Nú fari eg at røkja mítt arbeiði. Eg skal út at ambæta neytunum.
(Stórbóndin fer. Adolf er einsamallur eftir)

Adolf: Íðan, so má eg taka teir sjálvur. Lukkutíð, at eg veit, hvar hann goymir peningin. Men hann veit ikki, at eg veit tað.
(Adolf fer yvir til vasan og tekur tveir 100 krónuseðlar upp úr honum)

Adolf: Nú taki eg hesar seðlarnar og rindi vertshúsmanninum, og fyri tað, ið loypur av, bjóði eg øllum á vertshúsinum eitt glas. — Pápi mín hevði kortini bara brúkt teir til jólagávur til systrarnar hjá mær — og til jólagreyt, sum Magna kundi borið vættrinum. Vætturin — ha — sovorðið møsn. EG haldi ikki, at vættrar eru til. Magna ber honum greyt og maltøl hvørji jól, men eg veit væl, at tað eru mýsnar og rotturnar, sum eta tað!
(Adolf fer út. Ljósið verður slókt.)

3. partur

(Stórbóndin og bóndakonan koma inn.)

Stórbónd.: Ha, mín góða kona. Íðan, tú vilt hava pening at keypa mandlugávu og rísgrýn fyri.

Bóndakonan: Ja — og jólagávur. Vit skulu eisini keypa okkurt til gomlu Marina niðri í smáttuni. Tað er hon, sum eigur ein so fittan son.

Stórbónd.: Ja, eg veit, at hann er fittur. Hann var her í áðni og bað um forskot at keypa jólamat fyri.

Bóndakonan: Ája, hann stríðist og strevast, men eins fátæk eru tey. Tað er synd, tí eg haldi, at Magna hevur gott eyga á honum. Eg haldi, at hon vil giftast við honum.

Stórbónd.: Tað fer ikki at bera til. Hóast hann er fittur, er hann fátækur.

Bóndakonan: Ája, men tað hevði verið gott, kortini....

Stórbónd.: Nú skalt tú fáa pening.
(Mortensen fer yvir til vasan og stingur hondina niður í hann. Men har finnur hann einki. Hann roynir aftur — sama úrslit. Hann ristir vasan, hyggur niður í hann....)

Stórbónd.: Hann er tómur! Hvør hevur tikið peningin? Man tað vera Sveinur? Eingin annar enn hann hevur sæð, hvar eg goymi peningin.

Bóndakonan: Áje!

Stórbónd.: Eg má fara at ringja til Mikkelsen politimann og siga honum frá hesum... *(Stórbóndin fer yvir til telefonina og ringir.)*
(Myrkur á pallmynd 2)

4. partur

Ljós á pallmynd 2. (Mikkelsen politimaður hevur lagt aðra hondina á økslina á Sveini.)

Politim.: Kom so! Tú skalt við niðan til stórbóndan. Tú skalt standa til svars fyri tað, sum tú hevur gjørt.

Marin: *(grætur)* Tað kann ikki vera Sveinur, sum hevur tikið peningin. Hann er ein góður drongur. Hann hevði ikki droymt um....

Sveinur: Stilla teg, mamma. Hetta fer at laga seg.

Politim.: *(tekur í armin á Sveini og fer avstað við honum)* Kom so!

Marin: *(grætur enn)* Hesi jólini eru syrgilig... men vætturin skal kortini hava sítt. *(Hon tekur eina skál við rísgreyti og eitt glas av øli og setur tað frá sær úti við vinstru megin)*
(Myrkur á pallmynd 1

5. partur

Ljós í salinum framman fyri pallin
Vit eru stødd við bóndagarðin hjá stórbóndanum. Adolf kemur gangandi, hann er fullur. Hann sær eina skál av greyti og eitt glas av øli, sum Magna hevur sett út.

Adolf: Hvat skoða míni eygu. Nú hevur Magna verið og sett greyt fyri vætturin. Hon er eitt dylhøvd. Men hyggið nú.... *(hann sparkar eftir greytaskálini og fer síðani inn í stovuna. Inn framman fyri pallmynd 2)*

Ljósið í salinum verður sløkt.

6. partur

Ljós á pallmynd 2
(Øll á bóndagarðinum, politimaðurin og Sveinur eru inni.)

Politim.: Tú noktar, at tú hevur tikið peningin?

Sveinur: Ja — hvussu skuldi eg havt borið meg at?

Stórbónd.: Tú kundi sníkt teg inn aftur í stovuna og tikið peningin, tá ið eg var farin út.

Sveinur: Tað havi eg ikki gjørt.

Adolf: Tað hugsi eg – hikst – at hann hevur gjørt. Hann sær soleiðis út. Hann hevur ivaleyst tikið peningin. Setið tit hann í geglið, handa tjóvin.... eg haldi eisini, at hann stjelur egg úr høsnarhúsinum.

Magna: Nei, ikki. *(grætur)* Hann hevur einki stolið.

Stórbónd.: Nú, nú, góða. Tað er líkt til, at tað er júst hann. Tað er ikki við mín góða vilja, men løgreglan má taka sær av honum. Tað ber ikki til at lata tjóvar ganga leysar.

Sveinur: Eg havi einki gjørt.

Adolf: Tveitið hann í kasjottina, handa tjóvin..... at vága sær at koma her og stjala pening frá fólki.

Myrkur á pallmynd 2

7. partur

Ljós á pallmynd 2
(Magna situr einsamøll eftir, hon grætur)

Magna: Mín neyðars unnusti. Nú verða vit ongantíð gift. Pápi játtar mær ikki at giftast einum manni, sum hann heldur vera tjóv. Hvat skal eg gera?
(Vætturin kemur inn, gongur eina løtu heilt stillisliga og melur, men fer so yvir til Magnu og nemur við økslina á henni.)

Vætturin: *(Harkar)* Lurta eftir mær og stilla teg. Hesum skulu vit fáa greiði á.

Magna: *(stúrsar og hyggur upp)* Hvør ert tú? Hvussu ert tú komin inn?

Vætturin: Eg eri vætturin. Eg búgvi á loftinum, og eg síggi alt, sum fyriferst bæði her á bóndagarðinum og í húsunum rundan um. Eg havi sæð alt. Tað var ikki Sveinur, sum tók peningin. Eg veit, hvør tað var, og eg skal hjálpa tær at fáa sannleikan fram.

Magna: Vilt tú tað? Góði, hjálp mær. Men hvør var tað, ið tók peningin!

Vætturin: Tað var beiggi tín.

Magna: Adolf? Ja, hann er eisini heilt forbiðin viðhvørt. Men hvussu skulu vit fáa hann at viðganga, at tað var hann? Nei, tað ger hann aldri, og so sleppur Sveinur heldur ikki leysur aftur. Pápi og løgreglan og øll fara at halda, at tað er hann, sum hevur gjørt tað.

Vætturin: Lat tú bara meg um tað, eg skal so sanniliga fáa alt aftur í rætt lag.

Magna: Men hoyr, sig mær, hvussu ber tað til, at eg ongantíð havi sæð teg, tó at tú býrt uppi á loftinum hjá okkum?

Vætturin: Tað er tí, at tað ber bara til at síggja meg um jóltíðir — og tað eru bara tey, sum hava borið mær greyt, sum síggja meg — og tað hevur tú gjørt. Tað er tí, at tú sært meg.

Magna: Jú, men hini, síggja tey teg ikki?

Vætturin: Jú, djórini — og børn; børn og ung upp í 16-17 ára aldur, tey síggja meg. Men ikki tey vaksnu, hjá teimum er hugflogið ikki nóg stórt. Men tað eru nøkur fá vaksin, sum enn seta mær greyt, og tey síggja meg — og teimum rætti eg fegin eina hjálpandi hond.

Magna: Tað er soleiðis, tað er....
(Margreta kemur inn høgru megin)

Margreta: Hevur tú sæð pápa?

Magna: Nei, men eg haldi, at hann er í fjósinum.

Margreta: Eg fari í fjósið at vita. *(Margreta fer út)*

Magna: Hon sá teg ikki!

Vætturin: Sjálvandi ikki. Eg segði tað beint í áðni, at tað eru bara børn — og tey vaksnu, sum bera mær greyt, sum síggja meg.

Magna: Ja, nú trúgvi eg tær.... men hvussu fáa vit beiggja mín at viðganga, at hann er tjóvurin?

Vætturin: Jú, hoyr meg: Vit geva honum eitt glas av sannleikadrykki.

Magna: Sannleikadrykkur? Tað ljóðar undarligt. Hvat er tað?

Vætturin: Í veruleikanum er tað bara rabarbusaft við einum sindri av pipari í. Men vit siga honum, at hetta er sannleikadrykkur, og at øll, sum drekka av honum, mugu siga sannleikan, tí annars fara tey at kenna tað, sum verða tey klípt í afturpartin.

Magna: Jú, men vanlig rabarbusaft. Hvussu í verðini skal hann kenna tað, sum verður hann klíptur?

Vætturin: Lurta nú. Adolf hevur ongantíð borið mær greyt — so hjá honum ber ikki til at síggja meg. Og hvørja ferð, hann lýgur, ja, so klípi eg hann.

Magna: Áh, soleiðis... áh, nú hoyri eg hann koma gangandi úti í túninum. Nú mugu vit skunda okkum. Hvussu fáa vit hann at drekka saftina?

Vætturin: Tað er lætt. Vit koyra saftina í eitt vínglas, so drekkur hann beinan vegin. Gev mær eitt glas.
(Magna tekur eitt glas úr einum skápi. Vætturin tekur eina lítla fløsku upp úr kotalummanum og eitt piparlæt úr buksulummanum, koyrir skundisliga alt í glasið og fer burturfrá. Magna skundar sær at seta seg í sofuna við stokkum. — Adolf kemur inn og sær beinan vegin glasið.)

Adolf: Aha, her stendur eitt glas við víni, tað var frálíkt. *(Drekkur alt í einum, gløðir heldur bilsin fram fyri seg, hostar og harkar ógvusliga.)*

Adolf: Puha, hvat var hetta, eg drakk? Slíkt havi eg ikki smakkað fyrr.

Magna: Hatta var ein sannleikadrykkur.

Adolf: Magna. Situr tú her? Eg sá teg ikki. »Sannleikadrykkur« sigur tú, Hvat er tað?

Magna: Tað er ein drykkur, sum fær fólk at kenna tað, sum verða tey klípt í afturpartin, um tey ikki siga sannleikan. Vætturin hevur bryggjað hann.

Adolf: Puha, tú og tínir vættrar. Vættrar eru ikki til. Og greyt hevur tú borið honum, tú ert ikki heilt rættsiktað.

Magna: Vit fáa at síggja. — Hevur tú givið rossunum í dag?

Adolf: Ja, sjálvandi.... *(vætturin klípir hann í afturpartin)* ...av, hvat var hatta? Tað var onkur, sum klípti meg *(vendir sær at vita, um onkur er aftan fyri seg)* Men har er eingin. *(Út móti áskoðarunum)*: Man tað vera nakað í hasum, sum hon sigur? Um sannleikadrykkin?

Magna: Hví stendur tú soleiðis? Hevur tú ilt nakrastaðni?

Adolf: Neiei, nei

Magna: Adolf, veitst tú einki um peningin, sum var stolin?

Adolf: Nei, einki.... *(hann verður klíptur)* Av, av. Nei, nei. Hvat er hetta?

Magna: Tað er sannleikadrykkurin. Eg haldi, at tú veitst okkurt. Tað var ikki Sveinur, ið tók peningin?

Adolf: Jú, tað var hann *(verður klíptur)* Av, av, av. Nei, tað var tað ikki. Tað var ikki hann.

Magna: Hvør var tað so?

Adolf: Eg veit ikki *(vætturin klípur hann fast, hann rennur runt og hyggur og leitar. Hetta verður spælt við ferð)* Av, av. Ja. Eg veit tað væl.

Magna: Var tað tú?

Adolf: Nei... *(vætturin klípir hann, hann ýlir)* Jú, jú, tað var eg. *(setur seg á ein stól, tivar)* Av, eg havi so ilt.

Magna: Hatta mást tú siga við pápa beinan vegin, so at Sveinur sleppur leysur aftur.

Adolf: *(púra fyri ongum)* Ja, eg skal siga tað. Bara eg sleppi undan at verða klíptur.

Magna: Nú fari eg eftir mammu og pápa, og so sigur tú teimum, sum er. *(Magna fer. Adolf er einsamallur, gongur og melur)*

Adolf: Nú havi eg ikki ilt longur. Drykkurin man ikki virka longur. Tá ið mamma og pápi koma, sigi eg, at tað var ikki eg, sum tók peningin. Eg sigi, at Magna hevur spunnið alt hetta í.
(Stórbóndin, bóndakonan, Magna og Margreta koma inn.)

Stórbónd.: Hvat er tað, eg hoyri, Adolf? Var tað tú, sum tókst peningin?

Adolf: Nei, nei, als ikki *(vætturin klípir hann bæði fast og dygt)* Jú, jú, jú, tað var eg.

Bónda-konan: Hvat bagir, góði drongur, ert tú sjúkur? Hyggið at honum, hvussu harmur hann er, tí hann hevur stolið. Kom higar, mín góði drongur. Mamma tín hevur fyrigivið tær.
(Adolf drýpur høvur og fer yvir til mammu sína.)

Bónda-konan: Men nú mugu vit eisini fáa handa neyðars unga mannin út úr geglinum aftur.

Stórbónd.: Ja, eg ringi beinan vegin til Mikkelsen løgreglumann og sigi, at hann skal koma aftur við Sveini. So fær hann samstundis at vita, hvussu alt hevur borist til — og tú, Margreta, góða, renn tú oman til Marinu í smáttuni og bið hana koma niðan. Vit hava eini gleðiboð til hennara.
(Margreta fer og stórbóndin fer yvir til telefonina at ringja.)

Vætturin: *(neggjandi)* he - he - he.

Myrkur á pallmynd 2

8. partur

Ljós á pallmynd 2
(Øll eru á pallinum)

Stórbónd.: Ja, Mikkelsen, politimaður. Hetta hevur víst seg at vera ein misskiljing, alt, sum tað er. Tað er als ikki Sveinur, sum hevur stolið peningin frá mær, men tíverri mín egni sonur, Adolf. Hann hevur viðgingið tað, og hann hevur givið mær lyfti um altíð at siga satt. *(Vendir sær ímóti Sveini)* Og tú, ungi maður, eg má biða teg so mangar gangir um fyrigeving. Eg havi illtonkt teg — grundarleyst — og tað var illa. Tað skal eg ongantíð gera aftur, tað havi eg lært nú. Kona mín hevur sagt mær, at tú og Magna eru góð hvørt við annað, men at tit ongantíð hava torað at spurt meg, um tit kunnu giftast. Eg havi altíð hildið teg verið ein góðan og dugnaligan hjálparmann her á garðinum, og nú veit eg, at tú eisini ert ærligur. Tí fari eg at lata teg og Magnu sleppa at giftast.

Magna: *(Loypur upp og kastar seg í føvningin á Sveini)* Endiliga!

Stórbónd.: Annað er so tað, at eg leingi havi ætlað mær at latið Adolf fest garðin. So hevði eg verið haldbóndi. Men eftir tað, sum er hent í dag, havi eg gjørt av, at Adolf skal ikki festa garðin. Tað skulu tit í staðin, Magna og Sveinur. *(Magna kroystir pápa sín)*

Magna: Túsund takk, pápi. *(Mussar hann á kjálkan)*

Sveinur: *(Tekur í hondina á stórbóndanum)* Takk verfaðir.
(Adolf er firtin, bóndakonan kroystir Magnu, Margreta er ovurblíð, Marin turkar sær eyguni, politimaðurin smílist.)

Politim.: Nú er málið greitt! Stórbóndin, eg skilji á lagnum, at tygum taka sakarmálið ímóti Sveini aftur?

Stórbónd.: Ja.

Politim.: So er ikki annað eftir enn at ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól.
(Tekur hondina upp til kaskettin og fer.)

(Ljósið verður sløkt)

LIÐUGT